Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 05.12.2023
Mál nr.: 23/163310
Málsviðgjørt: JEK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjalslógin, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 61 frá 22. mai 2023, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 3 d. Tey, sum gera íløgur í góðkendar hitapumpuskipanir til upphiting og heitt vatn í sethúsum og bygningum, kunnu eftir umsókn fáa endurgoldið part av meirvirðisgjaldinum av íløgukostnaðinum til hitapumpu, útbúnað og arbeiðsløn. Í 2021, 2022 og 2023 verður alt meirvirðisgjaldið endurgoldið. Í 2024 og 2025 verður helvtin av meirvirðisgjaldinum endurgoldið. Í 2026 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjaldið ikki endurgoldið.	**1.** § 3 d, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Tey, sum gera íløgur í góðkendar hitapumpuskipanir til upphiting og heitt vatn í sethúsum og bygningum, kunnu eftir umsókn fáa endurgoldið part av meirvirðisgjaldinum av íløgukostnaðinum til hitapumpu, útbúnað og arbeiðsløn. Í 2024 verður alt meirvirðisgjaldið endurgoldið. Í 2025 verða 75% av meirvirðisgjaldinum endurgoldin, í 2026 verða 50% av meirvirðisgjaldinum endurgoldin, og í 2027 verða 25% av meirvirðisgjaldinum endurgoldin. Í 2028 og fylgjandi ár

	verður meirvirðisgjald ikki endurgoldið. Fyri at koma undir endurgjaldsstigið eitt ávíst ár, er tað ein treyt, at arbeiðið er gjørt og goldið tað árið.”
§ 3 d. *Stk. 2.* ... *Stk. 3.* Fyri at fáa endurrindað meirvirðisgjaldið sbrt. stk. 1, skal: 1) talan vera um sethús ella bygningar, har hitapumpa letur í minsta lagi 80% av samlaðu nýtsluni til upphiting og heitt vatn, og restin av nýtsluni eisini er grundað á el, 2) umsóknin á serskildum oyðublaði við kvittanum fyri goldnu íløguútreiðslurnar til hitapumpu, útbúna og løn, umframt váttan upp á treytirnar, settar í nr. 1), 5) og stk. 4, verða góðkendar og váttaðar av Umhvørvisstovuni, 3) ...	**2.** Í § 3 d, stk. 3 verður aftan á nr. 1 sum nýtt nr. sett: “2) móttøkuváttan frá IRF ella Kommunalu Brennistøðini um burturbeining av oljufýrsútbúnaði fylgja við umsóknini, tá talan er um uppsetan av hitapumpuskipan í hús og bygningar, sum áður hava brúkt oljufýrsútbúnað til upphiting.” Nr. 2-5 verða eftir hetta nr. 3-6.
§ 3 d. *Stk. 2.* ... *Stk. 3.* ... ... 3) samlaðu útreiðslurnar verða hildnar í seinasta lagi 31. desember 2025,	**3.** Í § 3 d, stk. 3, nr. 3 verður “31. desember 2025” broytt til: “31. desember 2027”.
§ 3 d. *Stk. 2.* ... *Stk. 3.* ... ... 4) góðkend umsókn um endurrindan av meirvirðisgjaldi vera TAKS í hendi í seinasta lagi 31. mars 2026 og	**4.** Í § 3 d, stk. 3, nr. 4 verður “31. mars 2026” broytt til: “31. mars 2028”.
§ 12. Avgjaldsskyldug søla fevnir ikki um: ... h) Søla av tíðindabløðum og prenting fyri tíðindabløð.	**5.** § 12, stk. 1, litra h verður orðað soleiðis: “h) Søla av tíðindabløðum, undir hesum talgildum tíðindabløðum, og prenting fyri tíðindabløð.”

§ 20. Skrásett virkir skulu seinast 1 mánað og 10 dagar aftaná endan av 1. 3. og 4. avgjaldstíðarskeiði boða TAKS frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddina av søluni, sbrt § 12, stk. 1-4 og 6, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna. ...	**6.** § 20, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis: “Skrásett virkir skulu seinast 1 mánað og 10 dagar aftaná endan av 1., 3. og 4. avgjaldstíðarskeiði talgilt boða TAKS frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddini á søluni, sbrt. § 12, stk. 1-4, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna.”